## Gav áskoðarunum fingurin

Sveisiski top-dómarin, Massimo Busacca, hevur fingið floytibann í tríggjar dystir. Hetta hendir, eftir at hann í dysti millum Young Boys og FC Baden rætti tann minni pena fingurin móti áskoðarunum hjá Young Boys. 40 ára gamli Busacca er annars ein av mest virdu dómarunum í Sveis, og hann hevur dømt hópin av altjóða top-dystum. Eitt nú var hann maðuri, sum leiddi dystin millum Danmark og Portugal herfyri.



## Skulu spæla samstundis

Kappingarnevndin hjá FSF hevur undan seinastu leikumførunum boðað frá, hvørjar klokkutíðir dystirnir í ymsu deildunum skulu spælast. Hetta fyri at tryggja, at tað ikki ber til hjá feløgunum at spekulera í úrslitum av dystum, sum longu eru spældir. Fyri Vodafone-deildina merkir hetta, at dystirnir á næst seinsta leikdegi byrja klokkan 15, meðan teir á seinasta leikdegi byrja klokkan 14.30.




Væl av fólki var komið saman til kappingina, sum fór fram í ítróttarhøllini á Eiði

# Høvdu ítróttardag á Eiði

**Svanur skipaði um vikuskiftið fyri Eik-Cup í Borðtennis og boccia**

ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Byrjað var við einum breyðbita, og síðan setti Súrður Skaale dagin við eini góðari og rámandi røðu. Eftir hetta var tað eisini Sjúrður Skaale, sum stílaði fyri upphitingini til kappingarnar.

Tann fyrsta kappingin var ein royndarkapping millum Sjúrður Skaale og Elvin Weihe.

Umleið 34 luttakarar úr øllum landinum høvdu teknað seg til kappingarnar.

Boccia kappingin varð deild sundur í tvey. Onnur kappingin var fyri tey menningartarnaðu og hin fyri tey rørslutarðnaðu. Tað vóru spennandi kappingar, og tað leikaði mangan javnt á, men tað eydnaðist tó at finna vinnarar í báðum kappingunum.

Eftir bocciakappingarnar var borðtennis á skránni, og eisini tá varð kappingin hørð.

Eftir tær báðar kappingarnar, varð skipað fyri togtogan og eggja-renning, har luttakarar og hjálparfólk kappaðust. Áðrenn endað varð við kaffi, the og køkum, bleiv tjóðsangurin sungin.

Fyrireikarnir eru væl nøgdir við dagin, og vóna, at hettar kann verða ein árlig endurtøka.

**Boccia fyri menningartarnað**

| | |
|---|---|
| 1 | Jan Lindberg |
| 2 | Jógvan Brøðraberg |
| 3 | Jógvan av Vollanum |

**Boccia fyri rørslutarnað**

| | |
|---|---|
| 1 | Dánjal Jákup Djurhus |
| 2 | Martin K. Kristiansen |
| 3 | John Heri Johansen |

**Borðtennis**

| | |
|---|---|
| 1 | Júst í Túni |
| 2 | Elvin Weihe |
| 3 | Teodor Esmar Hansen |

# Flytingar til veturin

**Hondbóltskappingin stendur fyri framman, og síðani í fjør eru fleiri spælarar, sum hava valt at skifta felag. Niðanfyri prentað vit yvirlit yvir tær flytingar, sum higar til eru skrásettar.**

### Atlantic Airways-deildin

| | |
|---|---|
| Magnus Matras | (Neistin til Kyndil) |
| Pál M. Joensen | (Neistin til Kyndil) |
| Regin Joensen | (H71 til VÍF) |
| Kári Horn | (StÍF til Neistan) |
| Hans Arne Thomsen | (Kyndil til TK) |
| Damir Oros | (KÍF til TK) |
| Dánjal H. Kjærbo | (TK til H71) |

### Sunset-deildin

| | |
|---|---|
| Durita Christophersen | (Stjørnan til VÍF) |
| Halla Midjord | (Kyndil til VÍF) |
| Annika Poulsen | (Kyndil til VÍF) |
| Heidi Maria Akselsen | (Neistin til SÍF) |
| Jóhild Sørensen | (Kyndil til Neistan) |
| Lina Andriulyte | (VB til Neistan) |
| Lovisa Andreassen | (StÍF til Neistan) |
| Jacklin Durhuus | (Kyndil til Neistan) |

# Vilja hava aktiva heystfrítíð

**Fólkaheilsuráðið og ÍSF hava í felag sent út skriv til øll ítróttafeløg í landinum, har heitt verður á feløgini um at skipa fyri aktivitetum av ymsum slag í heystfrítíðini.**

RØRSLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tankin er, at feløgini hvør í sínum lagi hava opið ímillum klokkan 14 og ein ella fleiri dagar í heystfrítíðini, sum er 12. til 16. oktober. Við hesum skulu møguleikar skapast til øll – eisini tey, sum ikki eru limir – at royna seg innan ymsu ítróttagreinarnar.

- Okkara ætlan er, at tit røkka ungum sum eldri. Sjálvsagt serliga skúlaungdómi - ið jú hevur frí hesa vikuna, men eisini foreldrum og/ella ommum og abbum. Eitt hugskot frá okkum er, at tvey ættarlið royna seg, soleiðis at bæði foreldur og børn fáa nakað burturúr, verður sagt í skrivinum til feløgini.

Biðið verður um, at feløgini svara aftur til ÍSF og fólkaheilsuráðið innan 25. september, og eftir hetta verður roynt at samskipa øll tiltøkini. Millum annað við at gera skráir fyri hvørt økið sær.

## Vann bronsu í Bosnia/Herzegovina

Bjørk Herup Olsen var við til at vinna bronsu í Europa-Cup fyri lið um vikuskiftið.

Hetta gjørdi Bjørk, tá hon var partur av liðnum hjá Helsingør Atletik, sum hevði boðið henni pláss eftir góðu avrikini í DM fyri ungdómar, sum varð hildið fyri tveimum vikum síðani.

Luttakararnir, sum kappaðust í Bosnia/Herzegovina, vóru úr Týsklandi, Slovakia, Estlandi, Póllandi og Bosni/Herzegovina, og Bjørk tók lut í kappingini á 3.000 metrum.

Hitin undir kappingini var um tey 33 stigini, men hóast hetta var Bjørk leingi heilt frammi í oddinum. Móti endanum av teininum megnaði hon tó ikki at fylgja við í spurtinum, har ein pólsk genta var fyrst um málstrikuna. Nummar tvey gjørdist ein rennari frá Bosnia/Herzegovina, og Bjørk kom so á mál sum nummar trý.